**Toll- og Skattstova Føroya**

## Avloysarastarv sum tollari

Toll- og Skattstova Føroya er stovnur undir Fíggjarmálaráðnum, hvørs uppgáva er at fyrisita toll-, mvg-, kolvetnisskatta- og avgjaldslógirnar, inntøkuskattalógina v.m. og alla skuldarinnkrevjing hjá landinum.

Stovnurin hevur 150 starvsfólk og er skipaður soleiðis, at planlegging og menning fer fram í Stýrinum á Argjum.

Stovnurin er farin undir bygnaðarbroytingar. Samstarvið millum økisskrivstovurnar og leiðsluna í stýrinum skal mennast, og stovnurin skal veita borgarum og virkjum eina betri tænastu. Tær núverandi seks økisskrivstovurnar verða lagdar saman til tríggjar.

Í Miðøki starvast 52 fólk. Høvuðsskrivstovan, har viðkomandi koma at starvast, er á Smyrilsvegi, Posttolldeildin heldur til á Óðinshædd og Tollbúðin er á Eystaru Bryggju.

Heimasíða
www.tollskatt.fo

E-mail
tollskatt@tollskatt.fo

Við tolleftirlitið hjá Toll- og Skattstovu Føroya, Miðøki, er eitt avloysarastarv sum tollari leyst at seta frá 15. februar 2007 fram til 1. november 2007.

**Arbeiðsuppgávur**
Høvuðsuppgávan er alt vanligt tolleftirlitsarbeiði, íroknað eftirlit við flutningsførum og ferðandi.

**Førleikakrøv**
Tann, sum settur verður skal helst vera til aldurs um 25-35 ár og hava góða heilsu. Hava lokið eina miðnámsútbúgving t.d. HF-, FHS-, HH-prógv ella aðra útbúgving. Dentur verður lagdur á, at viðkomandi hevur lætt við at samstarva, er fyrikomandi, er arbeiðssamur og kann arbeiða sjálvstøðugt. Koyrikort til bil krevst.

**Vit kunnu bjóða**
Eitt spennandi starv við avbjóðingum, sum samstundis er eitt fakliga krevjandi og sjálvstøðugt starv í góðum arbeiðsumhvørvi.

**Setanartreytir**
Starvið er ikki tænastumannastarv, men verður lønt eftir lønarflokki 23 á byrjunarstigi í tænastumannasáttmálanum.

**Nærri frágreiðing um starvið**
Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Kjartan D. Joensen, yvirtollara, á tlf. 352600.

**Umsóknir**
Umsóknir við avriti av prógvum og upplýsingum um viðkomandi starvsroyndir, skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi 1. februar 2007

TOLL- OG SKATTSTOVA FØROYA
Traðagøta 39
Postrúm 2151
FO-165 Argir

## KUNNGERÐ

**Almennu kommunustýrisfundirnir í Kunoyar kommunu ár 2007 eru ásettir at verða hesar dagar:**

mánadagin 29. januar
mánadagin 26. februar
mánadagin 26. mars
mánadagin 30. apríl
mánadagin 28. mei
mánadagin 25. juni
mánadagin 30. juli
mánadagin 26. august
mánadagin 24. september
mánadagin 29. oktober
mánadagin 26. november
leygardagin 29. desember

Fundirnir eru settir at verða kl. 20.00 aðruhvørja ferð í Haraldsundi og í bygdahúsinum í Kunoy fyrsti fundur verður í Haraldsundi

Møguligar broytingar og eykafundir verða lýst á svørtutalvu

Mál, sum skulu verða viðgjørd á kommunustýrisfundi, skulu verða kommununi í hendi 7 dagar áðrenn fundin.

**Kunoy, 15. januar 2007**

**Kommunustýrið fyri Kunoyar kommunu**

# Koyri-kort?

Teoriskeiðið til persónbil, byrjar mánadagin
**22. januar kl. 17.00**

Teoriskeiðið til lastbil og trailara byrjar mánadagin
**22. januar kl. 19.30**

FØRARASETRIÐ
KOYRISKÚLI

**Stanley A. Olsen**
koyrilærari
**tel 21 10 99**

**John A. Christiansen**
koyrilærari
**tel 21 47 75**

**Jekaragøta 10 • Tórshavn**

**Visti tú ikki tað? Sosialurin**

## Starvsfólk til matvøruhandil

**Til Sp/f inn í Tórshavn verður søkt eftir einum starvsfólki at byrja skjótast tilber.**

**Skrivlig umsókn saman við avriti av prógvum og møguligum viðmælum skal vera inn í hendi í seinasta lagi 18. januar. Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Jaspur Johannesen á tlf. 774000.**

**Umsókn við møguligum prógvi/viðmæli verður at senda til:**

**inn**

**Landavegur 103**
**FO-100 Tórshavn**

***inn rekur handil við matvørum við herðslu á altíð at hava tað viðkomandi vøruúrvali, prísin og kundatænastuna. Dagliga starvast umleið 50 fólk í deildunum hjá inn í Klaksvík, Norðskála og í Tórshavn.***

## Havnar Sjónleikarfelag

**bjóðar limum við gesti til:**

sang og upplestur við **Willieboys** í Sjónleikarhúsinum mikukvøldið **17. januar kl. 20**

**Willieboys:**
*Arnbjørn Dalsgarð, Bárður Persson, Búi Dam, Høgni Egholm, Høgni Mohr, Oddfríður M. Rasmussen, Petur Pólsson, Sigrid Gaini*

"Fá meira fyri minni" við **Kristionnu Rein** mikukvøldið **24. januar kl. 20**

*Kostnaður á 125 kr. eru at fáa í Sjónleikarhúsinum ella við at rinda á konto nr 9181-1401671 í Eik Bank merkt dansur*

## Likvidatión

Sambært eykaaðalfundarsamtykt 31.12.2006 er Sp/f Norðberg, 740 - Hvannasund, skrás. nr. 3193, farið í sjálvbodna solventa likvidatión.

Til likvidator er vald Anna Maria Joensen, Karlsvegur 6, 700 Klaksvík.

Vísandi til smápartafelagslógina § 92 verða kravánarar felagsins skrivliga bidnir um at fráboða møgulig krøv til undirritaðu innan 3 mánaðar frá hesi kunngerð.

Klaksvík, 12. januar 2007
Anna Maria Joensen

**Sosialurin -har tað hendir**